# Nøvn

## Føðingar

17. mars fingu Unn Jónsdóttir Kragesteen og David Herálvur Geyti, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3890 gr.

28. mars fingu Pond og Jan Slættalíð, Langasandi, ein son. Hann var 47 cm langur og vigaði 2880 gr. Pond og Jan blivu gift í Thailandi 24. mars.

3. apríl fingu Barbara Vestergaard og Sigmund Ludvig, Vági, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4580 gr.

6. apríl fingu Beinta Árnadóttir, Argjum, og Petur Sigurð Johannesen, Norðskáli, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3750 gr.

7. apríl fingu Britt Tranberg Christensen og Dann Jacobsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3728 gr.

8. apríl fingu Gurli Isaksen og Hans Christian Petersen, Miðvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4000 gr.

8. apríl fingu Paula Annika Thomsen og Flemming Rud Jensen, Fuglafirði, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 2890 gr.

9. apríl fingu Beinta Vilhelmsen og Rói Hjaltalin, Tórshavn, ein son. Hannvar 56 cm langur og vigaði 4610 gr.

10. apríl fingu Rebekka og Rói Norðoy, Klaksvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3975 gr.

11. apríl fingu Mariann H. og Jóhan M. Stenberg, Sandavági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3500 gr.

12. apríl fingu Elin Poulsen og Kenneth Kjærbo, Sumba, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3655 gr.



## Próvtøka

Hesir fingu handað prógv í Dugnaskaparroynd í sigling, í Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúla, hósdagin 07.04.11.
Standandi frá vinstru: Magni á Deild Olsen, Birgir Johannesen, Rókur Eyvindsson, Torkil Holm Petersen, Ragnar Johannesen, Sigurjan Tavsen, Gunnar Knudsen, Mortan Johannesen, Heini Østerø, Axel Ljósheim
Sitandi frá vinstru: Petur Hans Dahl, lærari, Hans Petur Olsen, Sørin Svenning Danielsen, Vilhelm Samuelsen, Karl-Ole B.Larsen, Christian Poulsen, lærari

## John av Reyni Smiðjuni



Í døgunum 22. – 25. apríl hevur John av Reyni framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Talan er um framsýningina Náttúran og Tilveran við málningum, ið lýsa náttúruna og menniskjuna. Íblásturin kemur úr náttúrini, ið er so skiftandi og fangandi, og lýsir John hana og hennara skiftandi broytingar við sterkum litum yvir í mjørkakendu litirnar.

Í kenslusomum myndum lýsir John menniskjuna, ið er kring um hann, og tær kenslur, ið hann kemur í samband við í gerandisdegnum. John hevur áður sýnt fram á Ólavsøkuframsýningin í Listaskálanum og í Mullers Pakkhúsi, og hetta er aðru ferð, hann hevur framsýning í Smiðjuni.

Fernisering verður fríggjadagin 22. apríl kl. 16-19. Framsýningin verður annars opin leygardagin og sunnudagin kl. 14-18 og mánadagin kl. 14-19.



## Njál Djurhuus sjeyti

### 15. apríl 2011

*Havnin, Tinganes og Portugálið,*
*Vágsbotn, Reynið og Doktaragrund,*
*myndaðu mannin, lívið – og málið,*
*dygst frá lívsins morgunstund.*
*Mamman, abbin og omman reysta*
*lunnar løgdu til lívsins far,*
*við fyriðømi og førningi besta*
*bátur skotin av lunni varð.*

*Skúlin á Vaglinum, grótborgin fríða,*
*Mentanardepil við Havnará,*
*lærdi at lesa rokna og skriva,*
*lærdi út yvir heimin at sjá.*
*Lærdi at æra og elska sjálvt lívið,*
*náttúru Føroya við haga og strond.*
*Her fanst tú eydnuna, fagrasta vívið,*
*góvu hvørt øðrum hjarta og hond.*

*Frelsunarherurin, ljóðfør og streingir,*
*boðskapur mikil vann hjarta og sál.*
*Hetta gav ungmenni flúgvandi veingir,*
*kendi har kall og andaligt mál.*
*Slepti tí heimsins lokkandi málum,*
*gav teg til kallið við likam og sál,*
*fyri at bjarga søkkandi sálum,*
*og geva teimum eitt mið og eitt mál.*

*Í norðurlondum títt navn víða gingið,*
*tí tú teimum veiku ein vinur var*
*kongsheiðursmerki Noregs tú fingið,*
*heiður tú heimlandi tínum bar.*
*Tí takkar tær tjóðin, teg aldi til mans,*
*og virðir tað kall, tú fullførdi,*
*einaferð fært tú hin rættferðarkrans,*
*sum Harrin til reiðar tær gjørdi.*

*Við vinaheilsan frá samverkamanni*
*tínum á stríðvølli Harrans.*

**Svenning av Lofti**

Tekniski Skúlin Klaksvík

**Okkum vantar lærarar til komandi til skúlaár**

Størvini síggjast á www.tsk.fo

Tekniski Skúlin í Klaksvík